## Aker Seafood verri úrslit í ár

Fyrsta fjórðingsár í ár er ikki tað besta, sum fyritøkan Aker Seafood hjá norska ríkmanninum, Kjeld Inge Røkke, hevur sæð. Hóast eina øking í umsetninginum fyrsta fjórðingsár í ár upp á stívliga 36 norskar miljónir krónur, er úrslitið kortini helvtina verri enn sama fjórðingsár í fjør. Rakstrarúrslitið fyri avskrivingar er minkað úr 12,7% fyri fyrsta fjórðingsár í fjør niður í 9,2% fyrsta fjórðingsár í ár. Orsøkin er í fyrsta lagi, at felagið hevur gjørt íløgur í keypt virksemi, eitt nú í Fraklandi. Úrslitið eftir skatt er 17 miljónir norskar krónur, og tað er helvtina minni enn somu tíð í fjør. Orsøkin til lakaru gongdina, er, at norska krónan er økt, og at oljuprísirnir eru hækkaðir. Samstundis er dollarin minkaður í virði. Norska krónan er nevniliga økt 16% í mun til dollaran í eitt ár. Aker Seafood væntar kortini, at málið hjá felagnum at náa teimum 3 miljardunum í umsetningi, man fara at vera í nánd, tá árið er úti. Tað er Fiskeribladet Fiskaren, sum ber tíðindini um gongdina í felagnum hjá norska ríkmanninum.



# útlitini eru góð



um tiltaki fyri starvsfólki í alivinnuni.

- Hetta tiltak var væleydnað og fekk stóra undirtøku. Í februar í ár skipaði felagið aftur fyri aliráðstevnu, og aftur hesaferð í var undirtøkan stór.

Havbúnaðarfelagið heldur, at slík tiltøk hava alstóran týdning og eru ein av uppgávunum, sum felagið eigur at átaka sær fyri at økja um førleikan í vinnuni.

- Sum kjakast var um á seinasta aðalfundi, hevur Havbúnaðarfelagið havt ein meira virknan leiklut í altjóða høpi. Felagið er limur í FEAP, og hevur nevndin avgjørt at størri orka skal leggjast í hetta samstarvið.

### Vinnan væl fyri

Havbúnaðarfelagið sigur, at alivinnan er sum heild væl fyri, og úrslitini seinastu árini eru sera góð.

- Vinnan er umskipað síðan seinastu kreppuna, og útlitini eru góð. Karmarnir um vinnuna er góðir, og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Felagið heldur, at nú alivinnan byggir á góðar karmar og nærlagni, sum tikið verður til, er alivinnan í dag burðardygg.

- Hetta sæst aftur í avrikinum, tí fiskurin veksur sera væl og hevur sera lágt fellið. Saman við sera høgum marknaðarprísum skapti bæði 2006 og 2007 høgt avkast í alivinnuni. Alivinnan er í dag ein framleiðin vinna, sum nú er komin væl upp undanaftur frá kreppuárunum 2002-2005, sigur Havbúnaðarfelagið.

## Norðhavssild: Metstór gýting

**Ongantíð áður hevur ein nýggjur árgangur av sild fingið eina so góða byrjan, og ongantíð áður hava havgranskarar mált so nógv sildayngul sum í vár**

GÝTING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggja, sum norðmenn hava mált, er 108 billiónir sildayngul. Hetta ófatiliga tal av sildalarvum er mált av granskarum og tøkningum við norska havrannsóknarskipinum Håkon Mosby, sum júst er liðugt at kanna gýtingina av norðhavssild. Talan er um úrslitið av gýtingini fram norsku Møre-strondini.

- Talið av ynguli, sum liggur um 12 millimetrar til longdar, liggur uttanfyri fatanarevnini hjá vanligum fólki.

Tað sigur toktleiðarin, Erling Kåre Stenevik, við Fiskeribladet Fiskaren.

Norski Havgranskingarstovnurin hevur ongantíð áður mált so stórar nøgdir av larvum hjá norðhavssild. Gamla metið er frá 2006, og tá var talan um 99 billiónir yngul – ella 15.000 ferðir fleiri enn allir heimsins íbúgvar tilsamans.

Til samanburðar kunnu vit nevna, at í 1972 funnu norskir granskarar bert tvær sildalarvur fram við allar norsku strondini.

### Góð gýting

Øll hesi seinastu fimm árini hevur gýtingin verið stór.

- Á einari av mátistøðunum vórðu 48.843 larvur funnar í hvørjum rúmmetri av sjógvi, sum fór ígjøgnum trolið. Hetta svarar til eina larvu fyri hvønn litur av sjógvi, sigur Erling Kåre Stenevik, sum ongantíð áður hevur sæð so nógv sildayngul í veiðini í kanningunum.

Havgranskarin vísir á, at tað gleðiliga er eisini, at larvurnar vísa seg at hava nóg mikið av reyðæti at eta.

– Enn er alt ov tíðliga at siga, hvussu góður árgangurin av norðhavssild fyri 2008 verður, men grundarlagið fyri einum góðum árgangi er í øllum førum tað besta, ið hugsast kann. Deyðiligheitin í tíðini frameftir er velduga stór, og hvussu stórur árgangurin verður, síggja vit í fyrsta lagi, tá sildayngulin kemur norður í vakstrarøkini í Barentshavinum, sigur Erling Kåre Stenevik, toktleiðari.



*Útlit eru til ein óvanliga góðan árgang av norðhavssild í ár, siga norskir havgranskarar*

*Mynd: Mourits K. Joensen*